# Starvs- og persónsprofilur fyri deildarleiðara á deildini Aktuelt

KRINGVARP FØROYA

SEPTEMBER 2023

# INNIHALDSYVIRLIT

Inngangur ... 3
1. Um Kringvarp Føroya ... 4
Visjón, misjón og kjarnuvirði ... 4
2. Um starvið ... 5
Fokusøki í starvinum ... 5
Fyrsta árið ... 5
Framhald ... 5
Løn ... 6
3. Ábyrgd og førleikakrøv ... 7
Ábyrgd ... 7
Førleikakrøv ... 7
Fakligur førleiki ... 7
Leiðsluførleiki og persónligir eginleikar ... 7
4. Setanartilgongd ... 9
Tíðarætlan ... 9
Umsókn ... 9
Samband og upplýsingar ... 9

# Inngangur

Kringvarp Føroya, KvF, er einasti almenni fjølmiðilin í Føroyum. Tað setir stovninum serlig krøv um at framleiða og miðla hóskandi og álítandi tilfar til allar samfelagsbólkar á ymiskum miðlapallum, soleiðis at KvF røkkur øllum, har tey eru. KvF hevur stóran týdning fyri fólkaræðið í landinum, tí tað í virksemi sínum varpar ljós á og elvir til kjak um viðkomandi samfelagsviðurskifti. Hetta setir eisini krøv um innihaldsliga breidd í tilfari, sum eisini skal umboða allar partar av landinum.

Tað hevur týdning, at leiðslan í KvF á professionellan hátt gongur á odda í tráanini eftir at liva upp til hesi krøv og vísir ábyrgd og trúfesti í framleiðslu stovnsins, so kringvarpsbrúkarar kunnu hava álit á KvF. Samstundis hevur tað týdning, at leiðslan við virðiligari atferð torir at elva starvsfólkum til at vera slóðbrótandi, bjóða av og ganga á odda í føroyska miðlaheiminum.

Hesin starvs- og persónsprofilur skal geva umsøkjarum eina meira fullfíggjaða mynd av starvinum og tí, sum KvF væntar sær av leiðaranum á Aktuelt-deildini.

Starvs- og persónsprofilurin er grundarlag undir viðgerðini av umsóknum, tá mett verður um, hvørt umsøkjarar lúka krøvini, KvF setir til starvið.

Profilurin skal eisini tryggja, at KvF og umsøkjarar hava eina felags mynd av starvinum og væntanum til starvið, so sannlíkindini fyri, at setanin eydnast, eru betri.

# 1. Um Kringvarp Føroya

KvF skal framleiða og senda dygdargott tilfar og á henda hátt virka fyri, at allir borgarar í landinum gerast betur førir fyri at taka støðu til og ávirka samfelagsgongdina á ein fólkaræðisligan hátt. Hetta merkir, at stovnurin í public service-sáttmála við Mentamálaráðið hevur bundið seg til at tryggja eitt breitt útboð av sendingum og tænastum fyri alt Føroya fólk umvegis sjónvarp, útvarp, alnet og líknandi miðlar. Sendingarnar skulu m.a. fevna um sakligan og óheftan tíðindaflutning, upplýsing, mentan og undirhald, harundir eisini sendingar til børn og ung.

Somuleiðis skal KvF sum gluggi virka fyri, at føroyska tjóðin gerst betur før fyri at skilja heimssamfelagið og liva og virka í og saman við tí.

Miðlalandslagið er nógv broytt, og miðlatilboðini eru øðrvísi í dag. Í hesum skal KvF vera ein savnandi miðil, sum virkar í fólksins tænastu og røkir neyðugar public service-skyldur.

At røkja hesar uppgávur starvast umleið 80 fólk í KvF. Bygnaðarliga er KvF skipað við stjóra og 4 deildum, sum eru hesar: Fyrisiting, Tøkni, Mentan og Aktuelt.

Til tess at tryggja meginregluna um armslongd vísir stjórin í KvF til eitt stýri, sum landsstýrismaðurin í almanna- og mentamálum velur at hava yvirskipaðu leiðsluna av KVF.

Fleiri upplýsingar eru um stovnin á kvf.fo/umkvf.

## VISJÓN, MISSIÓN OG KJARNUVIRÐI

**Visjónin** hjá KvF er at vera fremsti mentanarberi føroyinga.

**Missiónin** er, at KvF skal ríka lív og samleika føroyinga við sendingum og tænastum, sum upplýsa, menna og undirhalda.

**KvF hevur 4 kjarnuvirði, sum eru:**

### Trúvirði

Starvsfólk Kringvarpsins skulu vísa ábyrgd og trúfesti í síni framleiðslu, so kringvarpsbrúkarar kunnu hava álit á Kringvarpinum.

### Virðing

Kringvarpið skal vísa virðiliga atferð í øllum sínum virki, arbeiða fyri at varðveita føroyskt mál og mentan og virka savnandi fyri føroysku tjóðina.

### Slóðbrótan

Kringvarpið skal vera slóðbrótandi, bjóða av og ganga á odda

### Professionalisma

Í Kringvarpinum skulu professionalisma, eldhugur, kreativitetur, fjølbroytni og toymisandi ráða.

## 2. Um starvið

Leiðarin á deildini Aktuelt er limur í leiðslubólkinum og vísir bygnaðarliga til stjóran.

Starvið er fulla tíð, og starvstíðin byrjar sambært nærri avtalu.

Uppgávurnar hjá deildini Aktuelt eru í høvuðsheitum at gera tíðinda-sendingar, aktuellar sendingar, kjak-sendingar og ítrottasendingar á øllum miðlapallum.

Tann, sum sett/-ur verður, má tola broytingar í starvinum, harundir bygnaðarbroytingar.

**FOKUSØKI Í STARVINUM** Fokusøkini eru innihaldsliga býtt í tvey tíðarskeið: Fyrsta árið og framhald.

### FYRSTA ÁRIÐ

Leiðarin á Aktuelt skal fyrsta árið menna deildina við neyðugum tillagingum, soleiðis at deildin kann møta nútíðarkrøvum til innihald og strategi samsvarandi hugsjónini fyri KvF. Hetta merkir m.a. at:

Við støði í visjón, missión og virðunum hjá KvF skal leiðarin á Aktuelt endurorða tilverugrundarlagið hjá deildini við atliti at m.ø.:

- kritiskum journalistikki
- at menna tilboðið til brúkaran á øllum pallum við serligum denti á talgildum pallum
- at menna perspektiverandi orðaskifti millum partar í samfelagnum – soleiðis at bólkar ikki kenna seg gloymdar
- at koma kring landið og kennast viðkomandi fyri allar føroyingar
- eyðmerkja og hava sjóneykuna á tær fimm til sjey, til eina og hvørja tíð, týdningarmestu søgurnar í samfelagnum og tryggja, at hesar verða sagdar á ein nøktandi hátt

Deildarleiðarin skal samstundis megna at lyfta kjarnuuppgávurnar á deildini og hava neyðuga fatan av, hvussu hesar verða loystar, og hvørjir førleikar krevjast til tess. Leiðarin skal nýta starvsfólkaliga og fíggjarliga tilfeingið á besta hátt at loysa uppgávurnar.

Aktuelt-deildin er ein týðandi partur av KvF. Deildin hevur gingið á odda við slóðbrótandi journalistikki og hevur veitt brúkarunum óheft, saklig og kritisk tíðindi um føroyska samfelagið í breiðastu merking. KvF hevur virðing millum føroyingar og hevur ment góðar siðvenjur og ein sterkan fakligan integritet. Deildarleiðarin skal saman við starvsfólkunum á deildini bera hendan arvin víðari og tryggja og styrkja álitið á stovninum, innanhýsis og millum manna.

Inneftir skal deildarleiðarin, sum partur av leiðsluni, ganga á odda í at skapa eina felags mentan á stovninum við greiðum leiðslutilgongdum og heildarfatan í journalistikki, starvsfólka- og fíggjarviðurskiftum.

## FRAMHALD

Umframt at halda kós við støði í tí, sum er sett í verk fyrsta árið, skal deildarleiðarin á Aktuelt-deildini framhaldandi ganga undan við kveikjandi og stimbrandi hugburði og vera tilvitað/-ur um sín týðandi leiklut at røkka málum.

Deildarleiðarin skal støðugt menna deildina við at fremja og tryggja eitt gott og virkið arbeiðslag við týðiligum virðum, greiðum málum og krøvum um úrslit, sum eru í samsvari við tey mál, sum leiðslan í KvF setir, harundir:

- støðugt tryggja fokus á fakliga dygd og dygdargóðan journalistikk til allar føroyingar á heimasíðu og øðrum talgildum miðlum, útvarpi og sjónvarpi
- menna talgilda profilin á deildini, herundir presentatiónina av video- og ljóðtilfari til heimasíðu, sosialar miðlar og aðrar framtíðar pallar á netinum.  Talgild framleiðsla og útgáva skulu raðfestast høgt
- støðugt menna og betra arbeiðsgongdir á ein slíkan hátt, at sum best og mest fæst burtur úr starvsfólkaliga og fíggjarliga tilfeinginum
- vera virkin í leiðsluhøpi á ein hátt, sum stimbrar uppundir, at leiðslubólkurin virkar sum ein savnað, samskipandi og strategiskt hugsandi eind, sum við denti á felags mentan og greiðum leiðslutilgongdum og heildarfatan, tryggjar, at virksemi og tilfeingi á øllum virkisøkjum styrkja hvørt annað sum best.

## LØN

Starvið sum leiðari fyri Aktuelt-deildina verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

## 3. Ábyrgd og førleikakrøv

### ÁBYRGD

Deildarleiðarin á Aktuelt hevur mótvegis stjóranum í KvF ábyrgd av deildini.

Deildarleiðarin hevur inneftir ábyrgdina av at:

- leiða starvsfólkini á Aktuelt-deildini og tryggja sjónlig mál og úrslit
- tryggja, at starvsfólkini á deildini eru tilvitað um góðsku og eru sinnað støðugt at menna sínar arbeiðshættir og førleikar í samsvari við nýggj krøv og virðisgrundarlag stovnsins
- tryggja, at fokus er á journalistiskari dygd
- tryggja samstarv og samskifti við hinar deildirnar á stovninum og fremja heildarhugburð og vilja til at virka og avrika tvørtur um deildar- og fakøki
- fíggjarstýra og virða og sýna góðan fyrisitingarsið.

Deildarleiðarin hevur uppeftir og úteftir ábyrgdina av at:

- vera við til at mynda dagsskránna hjá KvF, seta mál, bjóða av, savna og skapa rúm fyri fjølbroytni
- megna at halda visjónir og møguleikar í miðdeplinum í samskiftinum við leiðsluna í KvF
- fremja hugsjónir KvF's í verki og geva stjóranum og leiðslubólkinum í KvF røttu vitanina at raðfesta við og taka avgerðir eftir
- umboða KvF í ymsum samstørvum.

### FØRLEIKAKRØV

Umsøkjarar verða mettir eftir fakligum, leiðsluligum og persónligum førleikum og skulu hava sum flestar av niðanfyristandandi eginleikum:

### FAKLIGIR FØRLEIKAR

- Viðkomandi útbúgving, t.d. innan miðlaøkið, og hollar journalistiskar royndir
- Leiðsluroyndir eru ein fyrimunur.

### LEIÐSLUFØRLEIKAR OG PERSÓNLIGIR EGINLEIKAR

- Hevur natúrligan myndugleika og jaligan atburð
- Er góður liðleiðari, sum savnar og fremur gott og jaligt samstarv
- Dugir at býta arbeiðið og at leiða deildina og torir og megnar at taka avgerðir
- Hevur yvirskipaða tilgongd – skilir týdningin av smálutunum í heildini uttan sjálv/-ur at fara í teir
- Er sjónliga eldhugað/-ur og tryggjar týðilig virði, greið mál og krøv um úrslit
- Dugir at arbeiða strategiskt og halda framlítandi fokus
- Er slóðbrótandi og dugir at eggja til nýhugsan
- Dugir at virka við fíggjarligum skili og effektivari nýtslu av tilfeingi
- Hevur góð evni at samskifta og at fáa boðskapin fram
- Er atkomulig/-ur og dámar tætt, skipað og opið samskifti og

samstarv við starvsfólk og leiðslu
- Sterk/-ur, málsøkin og vísir virðiliga og savnandi atferð.

# 4. Setanartilgongd

Setanartilgongdin verður skipað við einum samrøðuumfari.

Ein setanarnevnd velur nakrar umsøkjarar til eina samrøðu. Setanarbólkurin metir um umsøkjararnar og ger tilmæli um setan. Grundarlagið undir tilmælinum er umsóknin, samrøðan, harímillum upplýsingar frá samrøðuni, og persónliga medferðin undir henni. Kringvarpsstjórin setir starvið.

## UMSÓKN

Starvið er lýst leys í føroyskum miðlum og á heimasíðuni hjá Kringvarpi Føroya.

Umsóknir til starvið skulu vera KvF í hendi í seinasta lagi 26. september 2023.

Umsóknir við CV og viðkomandi prógvum skulu sendast til teldupostadressu: umsokn@kvf.fo. Viðmerk: “Deildarleiðari til Aktuelt” á umsóknina.

## SAMBAND OG UPPLÝSINGAR

Áhugaðir umsøkjarar, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu seta seg í samband við Ivan Hentze Niclasen, stjóra, á tlf. 347500 ella umvegis teldupost: in@kvf.fo.

Undir samrøðunum verður bert í avmarkaðan mun høvi at seta spurningar. Vit vísa tí eisini til kvf.fo/umkvf, har nógvar viðkomandi upplýsingar eru.